gult26 cyan26 magenta26 svart26



# Í Karlskoga



Lars Forsman undirvísir í týskum, enskum og esperanto á Karlskoga Folkhögskola í Svøríki. Royndir hansara eru endurgivnar í Esp-er-anto-nyt 3/1998 (Esperantonyt, Christiansgade 38, DK-9000 Aalborg) esperantonyt@esperanto.nu

Her er ein stuttur úrdráttur.

Fyri 10 árum síðan skeyt Lars Forsman upp á at byrja eitt esperantoskeið á háskúlanum. Starvsfelagarnir hildu hann vera øran, men rektarin helt, hann skuldi sleppa at royna eitt skeið í 8 vikur, sum er markið fyri ríkisstuðli. Tá ið tær 8 vikurnar vóru farnar, vildu næmingarnir ikki fara heim; teir flestu hildu fram, og aðrir komu afturat. Soleiðis byrjaði esperanto-linjan. Síðan tá hava næmingar úr 38 londum verið við. Eitt framhaldsskeið aðr-ar 8 vikur er eisini, og harafturat er eitt hálvárssskeið, við tað at fleiri lesandi ynskja at læra esperanto rættiliga. Eftir fáum vikum sita næmingar úr ymsum londum og práta í matarhøllini á esperanto.

Esperanto veitir grundleggjandi innlit í mállæru og millumtjóða orðatilfar. Eitt av mongum dømum er um ein lærara hjá 1. studentaskúlaflokki, sum undraðist á, so skjótt ein genta hevði tikið seg fram í fronskum; hann spurdi, um hon hevði verið frítíðina í Fraklandi. Tað hevði hon ikki, men hon var farin undir at læra esperanto. Hetta er kortini einki nýtt, at tann ið fyrst hevur lært esperanto, hevur nógv lættari við at læra onnur mál. Hesi 10 árini hevur Lars Forsman eisini so mangan sannað tað. Úrslitini eru so mikil, at mangir polittikarar, lærarar og onnur vilja ikki trúgva teimum ella hoyra um tey.

Lars Forsman heldur tað vera at spilla burtur tíð, pengar og sveitta - óneyðugt strev, ikki at nýta esperanto í skúlunum. Har er nógv at spara, eisini hjá næmingunum.

Dugir tú onnur mál frammanundan, er ikki verri. Ein italskur tolkur hjá Europa-samveldinum kom at vitja italska vinmann sín í Karlskoga. Hon helt lítið um esperanto, men læt seg av forvitni yvirtala til at fylgja undirvísingini eina viku. Eftir 5 døgum sat hon eitt heilt kvøld og prátaði við ein estlendskan lækna, sum áður hevði lært esperanto á háskúlanum, og hon var skakað: "Tosi eg veruliga eitt nýtt mál eftir 5 døgum? Aldrin hevði eg hugsað mær, at tað bar til at læra eitt mál so skjótt," var hennara ósjálvrádda viðmerking.

Lesið meir um Karlskoga folkhögskola á http://www.karlskoga.se/fhsk/ - Har verður undir Esperanto-linjuni m.a. upplýst, at summarskeið í esperanto verður í ár frá 24. til 29. juni og hálvárssskeið frá 16. august til 19. desember, og at "Vid en nyligen gjord språktest i 3 europeiska länder visade det sig att elever med Esperanto redan efter ett år lyckats 30-35% bättre än sina kamrater i tyska och engelska."

*Jeffrei Henriksen*

Arkiv Rediger Vis Meddelelse Format Funktioner Vindue Help 10:30 Outlook Express

Forrige Næste Svar Svar alle Videresend Flag Udskriv Rediger Slet Ombryd igen Indbakke

Frá: Firouz Gaini, fgaini@iname.com

**TELDUBRÆVIÐ**

Dagur 16.04.2001

Til: eirikur@sosialurin.fo

Evni: Vikuskifti

# Børnini á Øresund

Simona býr í J á Øresund á Amager í Keypmannahavn. Simona er føroysk, men familja hennara býr í fleiri londum. Hon eigur tvær langommur og ein langabba. Tey búgva í Sørvági, Ålsgårde og Teheran. Ommurnar búgva í Føroyum, abbarnir í Keypmannahavn og Oslo. Fyribils. Hon hevur ikki hitt langommu í Iran enn, men litmyndir eru sendar við posti báðar vegir. Simona lærir føroyskt heima og danskt í vøggustovuni. Seinni fer hon at læra enskt og kanska franskt ella spanskt ella persiskt? Møguleikarnir eru nógvir. Simona er uppkallað eftir ommuni og oldurabbanum, ið stovnaði háskúlan og skrivaði tjóðsangin.

Í grannalagnum, á Øresundskollegiinum, búgva fólk úr øllum heiminum. Meirlutin hevur danskan ella føroyskan uppruna, men íslendingar, amerikanarar, franskmenn, japanar, somaliarar, turkar og onnur hava eisini adressu á Dalslandsgade 8. Á spæliplássinum uttan fyri betongblokkarnar hoyrist danskt mál krúddrað við føroyskum, íslendskum og somaliskum orðum. Børnini hjá teimum lesandi spæla her. Nøkur teirra fara sjálvi at búgva á Øresund sum lesandi um eini tjúgu ár. Nøkur flyta úr Danmark forever, tá foreldrini hava fingið síni prógv og eru klár at fara á arbeiðsmarknaðin. Onnur verða verandi. Viðurskifti sum, hvar ein kennir seg heima, hvønn ein stovnar familju saman við, og hvørjar framtíðarætlanir ein hevur (um ein hevur nakrar), eru týðandi í valinum av heimaadressu.

Fyrr var frástøðan nógv longri úr Føroyum til Keypmannahavnar og restina av klótuni, tí sum antropologurin Thomas Hylland-Eriksen sigur kann man ídag “reise fysisk hvor som helst i verden på et par døgn, og man kan kommunisere med mennesker hvor det skulle være når som helst, ved hjelp af faks, fon, e-post og videosystemer...grensene mellom kulturområder blir stadig mer flytende”. Atlantic Airways bjóðar til dømis vikuskiftisferðir til Íslands, Danmarkar og Skotlands, og nú hava vit eisini fingið beinleiðis flogsamband til heimsbýin London. Tað er onki minni enn ein søgulig hending. Nógvar føroyskar familjur eru í tveimum pørtum: tey sum búgva heima og tey sum eru niðri. Og hóast tað er dýrt at flúgva, so eru nógv glað um at hava onkran tey kenna, onkran at vitja, úti í tí stóra heiminum. Fólk við royndum úr ymsum samfeløgum hava tann fyrimun, at tey duga at síggja tingini úr fleiri sjónarhornum. Tey skilja sjónarmiðini hjá øðrum enn sær sjálvum. Franski heimspekingurin Montaigne segði longu í sekstandu øld: “I am ashamed to see my countrymen besotted with that stupid disposition to shy away from ways contrary to their own...Wherever they go, they stick to their ways of abominate foreign ones”.

Børnini á Øresundskollegiinum eru øll ymisk, og hvørt einasta barn hevur stóran týdning fyri framtíðina. Tey eru børnini hjá tí nýggja ártúsundinum. Tey liva í einum øðrum familjumynstri, enn hitt eldra ættarliðið gjørdi. Blóð og jørð hava ikki líka stóran týdning fyri samleikan ár 2001 sum fyri hundrað árum síðani. Rithøvundurin Bringsværd sigur, at tann við báðum beinum á jørðini stendur í stað...tí samskifti millum ymsar sferur, bæði fysiskar og mentanarligar, eyðkennir okkara tíð.

*Firouz Gaini*

gult27 cyan27 magenta27 svart27




Starv

## Fólk til farmastøðina á Drelnesi

Strandfaraskip Landsins lýsa við hesum eftir einum lastbilførara til farmastøðina á Drelnesi, Tvøroyri

**Uppgávurnar hjá farmastøðini**

Høvuðsuppgávan hjá farmastøðini, sum er undir farmaflutningsdeildini, er at fyriskipa, samskipa, viðlíkahalda og menna farmaflutningin millum meginøkið og útjaðarøkini í Føroyum.

Aðrar uppgávur eru:

- Tryggja ein støðugan rakstur av farmaflutninginum
- Kundamóttøka
- Frankering
- Skipaavgreiðslur
- Ráðlegging og samskipan viðvíkjandi koyringini

**Starvið fevnir um**

Høvuðsuppgávurnar hjá lastbilføraranum er at vera við til:

- Farmaflutning og farmaavgreiðslu
- Fylgja uppgávum, málsetningum o.ø. fyri farmastøðina
- Tryggja gott samstarv við kundar, myndugleikar og aðrar samstarvsfelagar
- Vegleiða og upplýsa kundar
- Frágreiðingarskyldu yvirfyri farmastøð-leiðaranum

**Førleikakrøv**

- Koyrikort til lastbil/trailara
- Krana- og trukkprógv
- Arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva
- Góðan røkjuskap og er kundavinarligur

**Setanartreytir**

Løn- og setanartreytir verða eftir sáttmálanum hjá Føroya Arbeiðarafelag.

**Umsóknir**

Umsókn við avriti av prógvum, ummælum, CV og tilvísingum skulu sendast til:

***Strandfaraskip Landsins***
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 14. mai 2001. Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Heina á Borg, farmaflutningsleiðara

Tlf. 343060 ella e-post: hab@ssl.fo

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um*

STRANDFARASKIP LANDSINS



## Starv í Føroya Skúlabókagrunni

Eitt starv í Føroya Skúlabókagrunni verður lýst til setanar sum skjótast og ikki seinni enn 1. august 2001.

Starvið fevnir í høvuðsheitum um praktiskt útgávuvirksemi, ráðgeving og vegleiðing í sambandi við at geva út fjølbroyttar undirvísingarmiðlar til føroyska skúlaverkið. Ein partur í starvinum verður at kunna seg við tørv á tíðarbærum undirvísingarmiðlum, lærugreinum og undirvísingarevnum, eina helst í fólkaskúlanum, eisini í teld og teldutøkum útgávum. Upplæring kann verða neyðug.

Til starvið krevst útbúgving sum fólkaskúlalærari, í minsta lagi 5 ára undirvísingarroyndir, dyggur fakligur førleiki, hollur kunnleiki í føroyskum og kunnleiki í teld.

Løn og setanartreytir verða eftir sáttmála við Føroya Lærarafelag og við góðkenning Fíggjarmálastýrisins. Royndartíðin er eitt ár.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal vera skúlabókanevndini í hendi ikki seinni enn 8. mai 2001. Gjølligari upplýsingar um starvið fáast frá skrivaranum í skúlabókanevndini, Heðini M. Klein, telefon 316100.

Tórshavn, 29. mars 2001

Føroya Skúlabókagrunnur
Skúlabókanevndin
Lützenstrøð 4 · FO-100 Tórshavn
Telefon 316100



## Upplatingartíðir

Í summar eru upplatingartíðir okkara hesar:

| | |
|---|---|
| Mánadag og fríggjadag | *07.00–17.30 |
| Týsdag–hósdag | 08.00–17.30 |
| Leygardag | 09.00–13.00 |

*til og við 18.05. tó frá kl. 08.00.

**P/F SMYRIL LINE**
Tlf. 345900
E-mail: booking@smyril-line.fo



Søkt verður eftir royndum

## lastbilførara

at koyra lastbil v/ krana.

J & K
**Tlf. 315060**



## Søkt verður eftir fólki

Til sandsúgvarar hjá ROHDE NIELSEN A/S sóknast vit eftir fólki við hesum sjóvinnubrøvum:
– Fiskiskipari
– Stýrimaður 3. stig
– Maskinist
– Royndur dekkari (skipsassistentur)
– Ófulltikin dekkari
– Skipskokkur

Skipini eru í vinnu WORLD WIDE.
Mynstringartíðin er ein til ein – 1/1.
Áhugað biðjast um at senda skrivliga umsókn til:

**ROHDE NIELSEN, FØROYAR**
Box 1252 · FO 110 Tórshavn
Tlf. 318531



## Ekspeditrisa

Til handilin við Landavegin verður søkt eftir tilkomnari kvinnu til skiftandi vaktir.

BAKARÍIÐ
P/F HJÁ GUNLEIVI
Ring 22 51 60 ella 31 21 61



## Kømur ynskjast

Søkt verður eftir 2–3 kømrum við atgongd til køk og bað.

J & K
**Tlf. 315060**



## Lastbilur til sølu

Volvo F10 lastvognur við retardara árg. 84 og Palfinger 19 tm krana við radiostýring og spæli, árg. 96 til sølu um hóskandi boð fæst.

**Pf. Heri Thomsen**
Tlf. 441900
E-mail: transport@transport.fo